# PLANTUPAKKAR

## 1 Escallonia macrantha, Eskallonia



Hávaksin veturgrønur runnur. Rættiliga harðførur. Reydligar blómur, og angandi bløð. Trívst best í góðari, gloprutari jørð. Hóskar væl til lívdarál. Natúrlig útbreiðsla: Kili. Okkara tilfar: uppruni úr Orknoyggjum.

## 2 Pseudopanax colensoi, Pseudopanaks



Hávaksin veturgrønur runnur. Vanliga antin bert sum kall- ella kvennplanta. Blómurnar hava ein týðiligan hunangsanga, og plantusevjan er serliga kleimin. Trívst best í góðari jørð og lívd. Tolir nakað av skugga. Runnurin hóskar eisini væl at hava í eini stórari krukku, t.d. í eini garðsstovu. Úr Nýsælandi. Maori heitið er Whauwhaupaku.

## 3 Olearia macrodonta, Nýsælendsk Kristtorn



Stórur, breiðvaksin, veturgrønur runnur. Stór grágrøn grovtent bløð, men uttan tornir. Blómurnar líkar summardáa, í stórum tyssum. Eldri runnar blóma væl. Hóskar væl til girðing. Eingi ávís krøv til jørðildið. Harðførur, tolir væl sjóráma. Ber ein moskuskendan anga. Úr Nýsælandi.

## 4 Abies koreana, Koreaaðalgrann



Lítið nálatræ. Sera snotuligt og tættvaksið vakstrarlag. Nálirnar blágrønar og tættar. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst tó best í moldkendari jørð og góðari lívd. Er vælegnað, har lítið pláss er. Natúrlig útbreiðsla: Korea.

## 5 Malus sargentii, Sargents æble



Lágur, breiðvaksin, leyvfellandi runnur. Hvítar blómur í juni, smáar reyðar fruktir í oktober. Blómar best í fullari sól. Fær vakran appelsingulan heystlit. Fjálgar um fuglalív.

## 6 Spiraea, Japansspirea „Little Princess"



Miðalhøgur leyvfellandi runnur. Tættvaksið, kúput vakstrarlag. Ljósareyðar blómur, í stórum klasaskjólum á ársskotunum. Trívst best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. Úr Fjareystri.

## 7 . Cotoneaster bullatus, Bálukotoneaster



Hávaksin leyvfellandi runnur. Bløðini týðiliga bylgjut, fagurlitt um heystið. Bjartreyðar fruktir. Harðførur, eingi stórvegis krøv til jørðildið ella sólargang. Hóskar væl sum girðing. Natúrlig útbreiðsla: Vesturkina. Okkara tilfar: úr Danmark.

## 8 Larix x eurolepis, Blendingslerkur



Stórvaksið leyvfellandi nálatræ. Nálirnar fagurgulan heystarlit. Best í djúpari, gloprutari jørð. Ikki eins harðførur sum Japanslerkur, tolir minni vindslit, men veksur harafturímóti væl skjótari. Kann eisini hóska væl sum klipt, tøtt girðing. Er blendingur millum Larix europaea x L. kaempferi. Okkara tilfar: av donskum uppruna.

## 9 Pinus mugo var rostrata, Fronsk fjallafura



Lítið nálatræ, harðført, seinvaksandi. Eingi serlig krøv til jørðildið, men veksur best í gloprutari jørð. Slagið tolir ikki skugga. Hetta slagið av Fjallafuru hevur vanliga bert ein bul („einstammað"). Úr Pyrineafjøllum.

## 10 Sorbus mougeottii, Alpuroynir



Miðalstórt leyvfellandi træ. Tætt vakstrarlag. Grágrøn bløð. Nógvar hvítar blómur og reyð ber. Harðførur. Eingi serlig krøv til jørðildið. Líkist nógv Seljuroyni, men er minni av vøkstri, og blómar og fruktar betur. Natúrlig útbreiðsla: vestaru Alpufjøll. Okkara tilfar: av donskum uppruna.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA